Fólkatingsvalið X 2007

Takk fyri stuðulin til fólkatingsvalið

Sambandsflokkurin takkar hjartaliga tykkum, ið veittu flokkinum stuðul á fólkatingsvalinum 13. november. Ein serlig tøkk til tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við valstríðnum.



Helgi Abrahamsen, Svenning Borg, Annfinn Brekkstein, Johan Dahl, Marjus Dam, Erikka Elttør, Olav Enomoto, Edva Jacobsen, Eivind Jacobsen, John Kári Jacobsen, Edmund Joensen, Kaj Leo Johannesen, Bjørn Kalsø, Magni Laksáfoss, Høgni Mikkelsen, Gunnar K. Nattestad, Ingvør Nolsøe, Alfred Olsen, Marjun Olsen, Rósa Samuelsen, Bjarti Thomsen, Jaspur Vang

Sambandsflokkurin

– tín trygd

# Bókanýtt

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

## Nýtt STROK til børnini

**Áttanda nummarið av barna- og ungdómsblaðnum Strok liggur nú í skúlataskunum hjá børnum um alt landið**




Tað er eitt serstakliga litfagurt, forvitnisligt og fjølbroytt blað, skúlabørn og onnur fáa upp í hendurnar, tá tey blaka seg í sofuna við Stroki í hesum døgum.

Í blaðnum verður spurt, sum Gentur elska ljósareytt, ella um tað nú er so? Granskarar hava kannað yndislititn hjá vaksnum fólki, og úrslitini vísa, at kvinnur og menn hava serligar yndislitir. Men er tað eisini so hjá børnum?

Burturúr tilfarinum kunnu vit eisini nevna, at í "Lætt og Leskiligt" hesaferð er ein leskiligur pastarættur, sum er bæði léttur og skjótur at gera. Í greinini "Eitt sindur um 13-talið" er nógv forvitnisligt at lesa. Visti tú til dømis at setur og rað nummar 13 ikki eru í flogførum?

Eitt ørvísi lív. STROK hevur práta við íslendsku gentuna Jaru, um hvussu tað er at vera barn og ungur í Reykjavík, og vit lesa um Lort. Síggj hvussu feitt tað var!

Ynskimyndirnar hesuferð eru: Thierriy Henry og Dia Regin.

Eisini eru Blits, Fríkorterið, Krossorðagátan, Børnini tekna, Børnini skriva og mangt annað í blaðnum.

## Eitt hol í sálini

**"Eitt hol í sálini" eitur fyrsta krimibókin í spildurnýggju bókarøðini 3 VINKONUR, sum serliga er ætlað ungfólki millum 12 og 16 ára aldur og snýr seg um kærleika, vinalag, einsemi og morð**

Ein ung genta verður funnin deyð, flótandi á einum lítlum vatni í Djúpadali. Hon er nakin og pakkað inn í plast. Onkur, sum kendi hana, hevur dripið hana.

Soleiðis byrjar nýggja ungdómsbókarøðin 3 VINKONUR. So verður tíðin skrúvað tríggjar vikur aftur, og vit fáa forsøguna til morðið at vita, dag undan degi. Bara eitt er vist – tann dripna er ein av teimum fýra høvuðspersónunum, ið eru: Vilborg, Nora, Trina og Benadikta. Men hvør teirra er tað? Og hví?

### Krimirøð fyri ungdóm

Høvundur er navnframi norski rithøvundurin Kjetil Johnsen, ið við bókum sínum rúnabindur ungar gentur og dreingir. Hetta síðsta árið hevur hann brúkt til bókarøðina 3 VINKONUR, harav hann nú hevur skrivað tær fyrstu fimm. Ætlanin er at skriva í alt 10 ella 12 bøkur.

Hetta er fyrsta bókin í røðini á føroyskum. Bøkurnar eru serliga ætlaðar ungfólki millum 12 og 16 ára aldur. Jákup í Skemmuni týddi, og Forlagið Nýlendi gevur út.




*„Eitt hol í sálini" varð send út sum gáva saman við stóra norska ungdómsblaðnum „Topp" í summar. Seinasta bókin er í Norra prentað í ikki færri enn 80.000 eintøkum*

"Eitt hol í sálini" er 176 blaðsíður og fæst í bókabúðum fyri 79,95 kr.